# Mistøkini og tilvildin

**"Á, Timoteus. Varðveit tað, sum tær er litið upp í hendur, og vend tær burt frá hinum vanheilaga, tóma tosi og mótstøðu "kunnskaparins" – sum tað av órøttum verður kallað, og sum nøkur játta seg undir og eru vilst burt frá trúnni. Náðin veri við tær." (1. Tim.6:20-21)**

Boðskapur mín hevur heiti "Mistøkini og tilvildin í menningarlæruni", um mær er loyvt at lána eitt heiti frá sjónvarpi og umbroyta tað í ávísan mun. Men viðvíkjani menningarlæruni eru ikki bara smávegis mistøk, men eisini tilætlaðar svikagerðir. Eitt hitt mest mishugaliga við komu darwinismunnar er, at hon inn í vísindina skoytir uppí ein svikarátt, slíkt sum ikki varð sæð áður.

Um mær má vera loyvt at vísa til tað, sum heimsnavnframi skordýrafrøðingurin Dr. W.R. Thompson skrivaði, sum í mong ár var leiðari á Commonwealth Institute of Biological Control í Ottawa, Canada. So tignarligur náttúruvísindamaður var Dr. Thompson, at hann í 1959 var útvaldur at skriva fororði til hundrað ára upplagi av útgávuni hjá Darwin "Origin of Species." Hetta fororð er eitt breiðsíðu álop ímóti menningarlæruni av einum av heimsins størstu vísindamonnum. Tað er vert at lesa. Her verður sagt : "Henda støða, har menn renna um kapp at verja eina læru, sum teir ikki eru førir fyri at skilmarka vísindaliga, enn minnið at prógva við vísindaligum strangleika, roynandi at hevda lærunnar virði fyri almenninginum við at kúga sannar atfinningar og at útihýsa meinbogum, hetta er ókent og illa dámt í vísindini." Seinni segði hann: "Viðgongd Darwins gekk hond í hond við afturgongd hinna falsleysu vísind."

Harafturat sigur Dr. T.N. Tahmisian, sum er lívvirkisfrøðingur fyri the Atomic Energy Commision: "Vísindamenn sum læra at menningarlæran er lívsins veruleiki, eru teir stórir visindamenn? Ja, stórir svikamenn, og søgurnar teir siga eru størstu villusøgur gjøgnum allar tíðir."

Lat okkum fara at hyggja eftir hesum søgum í dag og síggja um tær eru vísindaligir veruleikar, ella um tær eru størstu villusøgur gjøgnum allar tíðir; sanniliga ímillum "mistøk og tilvild" eru ikki mangar ábendingar um afturgongd fyri vísindaligum falsloysi.

**Endurtøku ástøði**
Ein og hvør sum fer á lærustovn at granska vísindi minnist professaran Ernst Haeckel og hansara biogenetisku lóg. Hann var ein av hinum fyrstu talsmonnum fyri endurtøku ástøðinum, ella sum tað er betur kent: "Ontegeny recapitulates Phylogeny." Hetta merkir at menningin av fostrinum í lívmóðrini hjá eini móðir fer ígjøgnum fleiri menningarstig. Frá einari kyknu..... síðani fjølkykna...... síðani fiskalíkt við toknum........ síðani apulíkt við hala......... og síðani verður tað eitt menniskja sum er farið ígjøgnum øll menningarstigini soleiðis sum menningarlæran lýsir mannasøguna.

Hetta ástøði var sett fram av týska professaranum Ernst Haeckel í síðstu øld. Við ágrýtni styðjaði Haeckel læruna hjá Darwin. Men nøkur ár seinni, tá alt hetta varð meiri kannað og tøknin gjørdist betur og kunnleikin um kyknirnar mentist, tá kom fyri dagin, at henda avskeplan varð sett í verk ímóti betri vitandi. Haeckel professari varð ákærdur við Jena University Court og varð funnin sekur. "Skuldartyngdur" játtaði hann sítt svik, sum eftir øllum at døma varð gjørt fyri at stuðla menningarlæruna.

Haraftrat segði Haeckel: "Sanniliga skuldi eg verið dømdur, varð tað ikki fyri tann veruleika, at í hundraðtali av øðrum eygleiðarum og lívfrøðingum lógu undir somu ákæru."

Tað syrgiliga er, at hóast Recapitulation Ástøði er fallið av hásætinum fyri mongum árum síðani, so verður tað kortini enn lært í mongum skúlum. Fyri umleið fimtan árum síðani vórðu ein professari í lívfrøði við Broward Community College og Dr. Robert Strong, ein gesta ráðharri, bjóðaðir til samkomu okkara til eina røð av gudfrøðiligum fyrilestrum; teir luttóku í orðadrátti viðvíkjani menningarlæru mótvegis skapan. Sjónarmiðini hjá lívfrøði-professaranum vóru av Dr. Strong fullkomuliga pettaði sundur, soleiðis at professarin varð noyddur at siga: "Mítt ástøði hvílir heilt og fult á nágreiniliga próvnum fyri menningarlæruni, sum byggir á fosturfrøðina: "Ontegeny recapitulates Phylogeny."

Lítið visti hann at ovastin í British Association for the Advancement of Science, ein av heimsins mætastu fosturfrøðingum, hevði sagt, at allar upplýsingar viðvíkjandi menningini av fostrinum nú eru kendar: Hvussu enn víkir og vendir so gevur fosturfrøðin menningarlæruni als ongan stuðul. Hann var syrgin at viðganga hetta. Og soleiðis hevði okkara professari í lívfrøði grundað allan sín stuðul á ástøði menningarlærunna á eitt prógv, sum als ikki var nakað prógv, Í meiri enn hundrað ár hava milliónir og aftur milliónir av lesandi verið lærd Recapitulation (endurtøku) Ástøði, at hitt vaksandi fostri, hitt ófødda, stuðlar menningarlæruni. Ein tilætlað lygn, sanniliga.

Tað tykist sum staðfestingin hjá Dr. Thompson, at koma darwinismunnar hevur dálkað vísindinnar reinlyndi er sonn, í øllum førum á hesum øki.

**Piltdown maðurin**
Síðani er tað hitt best kenda svik alra tíða: hin víðagitni Piltdown Maðurin. Tað var í 1912 at Arthur Smith-Woodward, stjóri í British Museum of Natural History í London, og Charles Dawson, lækni í medisin og leikmaður í palaeontology (læran um deyð dýr og plantur) avdúkaðu eitt kjálkabein og ein part av einum skølti í eini eyrholu tætt við Piltdown í Onglandi. Í øllum førum sá út til, at kjálkabeinið var rættiliga apulíkt, tá sæð verður burtur frá tí veruleika, at tær stóru tenninar, sum vanliga eru at finna í einum apukjafti, vóru ikki til staðar. Harafturat var hetta brúnligt á liti og at síggja til ógvuliga, ógvuliga gamalt. "Avdúkingin" varð prísað við fagnaðarrópum, hetta var: the "Dawn Man", hitt fyrsta "missing link". Í fjøruti ár hugdu lesandi kring knøttin eftir myndunum av hesum umskapaða "Dawn Manninum", hvørs skapilsi prýddi øll heimsins listasøvn. Her var "the missing link."

Fjøruti ár seinni, eftir at fluoride royndirnar vóru møguligar, tá vóru skølturin og kjálkabeinið kannað við fluoride. Úrslitið av hesi roynd var, at alduts ásetingin av skøltinum var ikki sum áður varð sagt 500.000 ár, men at hann einans var umleið 2000 ára gamal. Kjálkabeinið var einans nøkur ára tíggir til aldurs. Síðani varð hetta kannað undir mikroskopið (sjóneyku), her kom fyri dagin, at tenninar varisliga vóru fílaðar niður, so tær skuldu líkjast mannatonnum. Alt hetta var fargað við sterkum kryddi (salti) og øðrum evnum, fyri at tað skuldi síggja út at vera ógvuliga gamalt. Hetta varð sett niður fyri at verða funnið, ætlandi var tað sjálvur Dr. Dawson, sum gjørdist víðagitin vegna Eoanthropus dawsoni – eitt svik sum hevur førkað milliónir av lesandi burtur frá skapannarsøguni. Tað er prógvað at Piltdown Maðurin er ein stór svikagerð.

**The Orgueil Fall**
Ein onnur svikagerð er kallað "The Orgueil Fall." Í ein útsynning í Fraklandi verður sagt, at eitt petti av einum torusteini (meteorite) varð avdúkað; hetta var fyri meiri enn eini øld síðani. Hetta hendi einans fimm vikur eftir at Pasteur hevði sína stóru røðu og gjørdi enda á ástøðinum um sjálvkravda menning av lívinum. Menningarlæru fjepparanir vóru í slíkan mun skelkaðir, tí ástøði teirra um sjálvkravda menning av lívinum varð lagt í oyði, at onkur ætlandi avdúkaði hetta petti av einum torusteini, sum innihelt lívrunnið tilfar. Men næstan eina øld seinni við nýggjari kanning vísir hetta seg at vera ein snilt upphugsað eftirgering. Svikamaðurin hevði eyðsýniliga á ein ella annan hátt slevja og vætt torusteinin, inntil hann gjørdist bleytari, síðani hevði hann brúkt eitt slag av límI sum bindievni, koyrt eitt sindur av jarðligum lívrunnum tilfari í, fjalt hetta og hita tað so tað skuldi líkjast árininum sum jarðarhitin kundi geva, fyri síðani at siga at enn er vón fyri náttúru menning lívsins, tí hetta má vera komið higar sum ein torusteinur. Aftur ein illvilja svikagerð útint ímóti børnum okkara.

**Scopes Trial**
Síðani er tað hitt víðagitna Scopes Trial. Ein tyngjandi vitnisburður var tað, tá ið Clarence Darrow setti William Jennings Bryan í vitnisbás. Darrow sum var gudloysingur og evolutionistur spurdi Bryan, um hann visti, at í heimstati hansara, Nebraska, livdi fyri eini millión árum síðani eitt slag av menniskjum. Bryan svaraði at hann visti einki um hetta, og at hann ei heldur trúði tí. Síðani fekk Darrow eisini, tann tá í tíðini mest virda vísindamannin innan læruna um deyð dýr og plantur, Dr. Henry Fairfield Osborn við American Museum of Natural History, upp í leikin. Hann váttaði at í 1922, trý ár undan hesum, vóru prógv funnin, at eitt slag av menniskjum fyri eini millión árum síðani livdi í Nebraska. Bryan var málleysur.

Hetta var almannakunngjørt um alheimin. Men táið vísindamenn fóru at kanna hetta sokallaða prógv, komu teir fram til, at henda avdúking var gjørd av einum manni nevndur Harold Cooke. Uppdaganin varð síðani í roynd og veru á hóskiligum fakmáli skírt: Hesperopithecus haroldcookii, sum merkir "Western ape-man". Hvat var tað hesir vísindamenn raktu við ? Teir komu fram á, at hetta "prógvið" einans var ein tonn. Ikki tenn, ella kjálkabein, ella skøltur – men ein tonn. Nakað seinni á sama øki raktu teir við eina aðra tonn, meinlíkari hini fyrru. Men henda seinna tonnin var føst í einum kjálkabeini, sum hoyrdi til eina beinagrind, og beinagrindin var av einum grísi; ella fyri at vera meiri beinrakin: einum avoldaðum grísi. Dr. Duane Gish segði, at hetta var hvørki "ein mannalík apa, ella eitt apulíkt menniskja, men ein avoldaður grísur." Hann segði eisini: "Eg haldi at hetta er eitt dømi um, at ein vísindamaður gjørdi eitt menniskja av einum grísi og ein grísur gjørdi eina apu av einum vísindamanni."

Men vinir mínir, má tað vera mær loyvt at siga tykkum, at allastaðni í lærubókunum í skúlum okkara vóru tekningar og endurskipanir (broytingar) av hesum at síggja, harafturat vóru modell av hesum sett inn á listasøvnini vísandi Hesperopithecus haroldcookii í allari dýrd síni, sitandi runt um eldin við familjuni við einum gassa um herðarnar. Teir høvdu smíða okkara fullfíggjaða felaga. Her var hann, opinberur fyri øll at síggja – og alt sum tað snúði seg um var ein grísatonn. Eitt fólkaslag av monnum sum livdi í Nebraska fyri eini millión árum síðani ?? Sig so tað.



**Pithecanthropus**
Síðani er tað sjálvandi eisini hitt gitna "Pithecanthropus erectus". Allir næmingar sum fóru á hægri læristovn hildu, at nú var endiliga komin stundin, at ein ávísur var opinberaður, og tí kundi sigast: "Pithecantanthropus", bókstaviliga merkir tað "erect ape-man" ella "apu-menniskja, sum stendur upprætt." Pithecanthropus varð funnin av niðurlendinginum Eugene Dubois. Hann reisti frá Niðurlondum til Java við endamálinum fyri eyga at finna eitt apu-menniskja. Nú, tað sigur ikki so lítið um vísindaligan objektivitet, táið ein ferðast hálvan knøttin fyri at finna apumenniskjað, og voila – so finnur